Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	20. september 2023
Mál nr.:	23/18680
Málsviðgjørt:	BH/OYS
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	22. september 2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yrkisútbúgvingar
(Broyting í áseting um lønarendurgjald til læruplass)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum broytt við løgtingslóg nr. 65 frá 10. mai 2000, løgtingslóg nr. 48 frá 26. mars 2002, løgtingslóg nr. 107 frá 20. desember 2002, løgtingslóg nr. 17 frá 20. apríl 2004, løgtingslóg nr. 15 frá 16. mars 2006, løgtingslóg nr. 52 frá 17. mai 2011 og løgtingslóg nr. 29 frá 30. apríl 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 33, stk. 4, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
"Endurgjaldið er 60% av ásettu minstulønini sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg, um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið 3,5% ella lægri, og 90% um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið omanfyri 3,5%."

2. Í § 33 verður aftan á stk. 4 sum nýggj stk. sett:
"*Stk. 5.* Endurgjaldið verður ásett fyri hvønn einstakan lærusáttmála, tá ið lærusáttmálin verður undirskrivaður og verður síðan støðugt alt sáttmálaskeiðið.
Stk. 5 og 6 verða eftir hetta stk. 6 og 7.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Lógaruppskotið er ein broyting av endurgjaldinum, sum landskassin endurrindar læruplássinum fyri lønina, sum tað hevur goldið lærlingi, meðan hann hevur tikið ta til læruna hoyrandi skúlagongd. Í staðin fyri, at lønarendurgjaldið altíð er tað sama, verður tað við hesum lógaruppskotinum konjunkturtongt.

Í verandi lóggávu fær læruplássið 75% endurgoldið av minstuløninni sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg. Lógaruppskotið leggur upp til, at læruplássið fær 60% endurgoldið, tá miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið 3,5% ella lægri, og 90% um miðal arbeiðsloysi seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið omanfyri 3,5%. Endurgjaldið verður ásett fyri hvønn einstakan lærusáttmála, tá ið lærusáttmálin verður undirskrivaður og verður síðan støðugt alt sáttmálaskeiðið.

Endamálið er at gera tað lættari hjá læruplássunum at taka lærlingar, tá tíðirnar eru ringar og arbeiðsloysið er høgt, og vandi er fyri, at lærlingatilgongdin minkar í mun til hóskandi tilgongd av lærlingum. Øvugt í góðum tíðum, tá arbeiðsloysið er lágt, og læruplássini hava nógv at gera og taka fleiri lærlingar, kann lønarendurgjaldið verða lægri.

Fyri landskassan merkir lógaruppskotið, at útreiðslurnar í verandi løtu verða lægri, tí arbeiðsloysið er niðanfyri 3,5%, men gerast tíðirnar verri og arbeiðsloysið fer upp um 3,5%, økjast útreiðslurnar aftur.

Lógaruppskotið tekur útgangsstøði í trípartaavtaluni frá 2019 millum Føroya landsstýri og partarnar á arbeiðsmarknaðinum, har eitt av átøkunum er at gera lønarendurgjaldið konjunkturtongt. Arbeitt verður við hinum átøkunum, og fyri at røkka flest øllum átøkunum í trípartaavtaluni, hevur landsstýrið sett sær fyri í samgonguskjalinum at raðfesta yrkisútbúgvingarnar frammarlaga, m.a. við átøkum frá trípartaavtaluni.

Eitt av átøkunum er at leggja uppskot um heimildarlóg fyri Løgtingið, sum heimilar landsstýrismanninum, tá arbeiðsloysið triðja mánaðin á rað fer upp um 3,5%, at uppraðfesta landsvegahaldið og umvæling av landsins bygningum. Endamálið er at viðvirka til, at virksemisstøðið í byggivinnuni og lærlingatalið verður hildið uppi, tá arbeiðsloysið hækkar, og vandi er fyri, at lágkonjunkturur er ávegis.

1.2. Galdandi lóggáva

Sambært §33, stk. 4 í galdandi lóggávu endurrindar landskassin læruplássum 75% av ásettu minstuløninni sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg, tá lærlingurin er í skúla.

Í kunngerð nr. 63 frá 23. apríl 2003 um lønarendurgjald og ferðaendurgjald til lærupláss, eru nærri reglur viðvíkjandi ásetingunum um lønarendurgjaldið.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at gera lønarendurgjaldið til læruplássini í sambandi við skúlagongd hjá lærlingum konjunkturtongt, soleiðis at munur verður gjørdur á lønarendurgjaldinum til lærupláss, alt eftir hvussu búskaparligu vánirnar eru. Í ringum tíðum

skal lógaruppskotið virka fyri at økja um áhugan fyri at seta lærlingar, tí lønarendurgjaldið fer upp á 90% av ásettu minstuløninni sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg, tá ið miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið omanfyri 3,5%. Um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið 3,5% ella lægri, er lønarendurgjaldið 60%. Endamálið er sostatt, at lønarendurgjaldið í størri mun tekur atlit at búskaparvánunum enn áður er gjørt.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógaruppskotið broytir lønarendurgjaldið, sum læruplass fáa, meðan lærlingar eru í skúla. Við verandi lóggávu fáa læruplass 75% endurgoldið av minstuløninni, tá lærlingur er í skúla, meðan hetta lógaruppskotið leggur upp til, at læruplass fáa 60% av ásettu minstuløninni sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg, um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið 3,5% ella lægri, og 90% um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið omanfyri 3,5%.

Broytingin kann, saman við øðrum átøkum í trípartaavtaluni, virka við til, at lærlingatalið verður meiri støðugt, tá tíðirnar eru verri, og vit hava eina búskaparliga niðurgongd. Fyrimunurin við broytingini er, at læruplass fáa eitt hægri lønarendurgjald, tá búskaparligu tíðirnar eru verri, og arbeiðsloysið fer upp um 3,5%, og kann lógaruppskotið tí verða við til at tryggja eitt meira støðugt lærlingatal.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur ikki verið til almenna hoyring. Lógaruppskotið er fyrireikað í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2024, har ein fortreyt er, at lønarendurgjaldið verður gjørt konjunkturtongt. Lógaruppskotið skal tí verða lagt fram og samtykt í seinasta lagi samstundis sum fíggjarlógaruppskotið. Avgerðin um at fyrireika málið bleiv tikin ov seint til at kunna senda uppskotið til almenna hoyring.

Á fundi í Yrkisútbúgvingarráðnum tann 19. september 2023 varð kunnað um lógaruppskotið. Í Yrkisútbúgvingarráðnum sita umboð fyri arbeiðsgevarar og fakfeløg. Yrkisútbúgvingarráðið hevur til uppgávu at viðgera mál um arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingar.

Føroya Handverksmeistarafelag hevur eftirfylgjandi valt at senda inn viðmerkingar til lógaruppskotið.

Føroya Handverksmeistarafelag viðmerkir, at tað als ikki er nøktandi, at slík lógaruppskot ikki verða send í hoyring, og at tað er villleiðandi at umtala lógaruppskotið sum eitt átak í trípartaavtaluni, tí tað ikki ber til at gera eina semju millum fleiri partar, fyri síðani bert at seta í verk tey átøk, sum tæna einum sjálvum og fremja sparingar.

Føroya Handverksmeistarafelag spyr víðari eftir hinum punktunum í trípartaavtaluni, ið skulu verða við til at betra yrkisútbúgvingarskipanina. Føroya Handverksmeistarafelag mælir í hesum sambandi til, at Føroya landsstýri setir neyðugu fíggingina av til yrkisútbúgvingarøkið, soleiðis at økið kann verða ment eins og semja var um í trípartaavtaluni.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal vísa á, at landsstýrið, í samgonguskjalinum, hevur sett sær fyri at raðfesta yrkisútbúgvingarnar frammarlaga, m.a. við átøkum frá trípartaavtaluni.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur við sær, at endurgjaldið, sum landskassin endurrindar læruplássinum fyri lønina, sum tað hevur goldið lærlingi, meðan hann hevur tikið ta til læruna hoyrandi skúlagongd, verður broytt. Lønarendurgjaldið er í dag 75% av minstulønini sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg. Við lógaruppskotinum verður lønarendurgjaldið gjørt konjunkturtongt, soleiðis at tað verður 60% av ásettu minstulønini sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg, um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið 3,5% ella lægri, og 90% um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið omanfyri 3,5%.

Í løtuni er arbeiðsloysið minni enn 3,5%, ið merkir, at lønarendurgjaldið frá 1. januar 2024 verður 60% fyri lærusáttmálar, sum verða gjørdir 1. januar 2024 ella seinni. Mett verður, at tað hevur við sær eina sparing á umleið 1 mió. kr. í fíggjarlógini fyri 2024.

Verða búskaparligu tíðirnar verri og arbeiðsloysið hækkar til meira enn 3,5%, kann roknast við, at útreiðslurnar hjá landskassanum økjast aftur, tí lønarendurgjaldið tá verður 90%.

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur við sær, at lønarendurgjaldið til læruplass verður konjunkturtongt. Læruplass fáa 60% av ásettu minstulønini sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg, um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið 3,5% ella lægri, og 90% um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið omanfyri 3,5%.

Tað verður ikki mett, at broytingin fer at hava nakrar munandi umsitingarligar avleiðingar fyri landið, men at umsitingin av hesum leistinum fer at hava við sær umleið somu umsiting, sum verandi leistur hevur. Tó mugu onkrar smærri tillagingar gerast í útgjaldsskipanini, sum Yrkisdepilin brúkar til at rinda út lønarendurgjøldini. Kostnaðurin av hesum er ikki kendur.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna, tí lønarendurgjaldið til læruplass verður broytt til at verða konjunkturtongt. Lógaruppskotið hevur við sær, at læruplass fáa 60% av ásettu minstulønini sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg, um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið 3,5% ella lægri, og 90% um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið omanfyri 3,5%. Í løtuni er arbeiðsloysið lægri enn 3,5%, ið merkir, at lønarendurgjaldið verður 60%, ið svarar til eina lækking á 20% í mun til lønarendurgjaldið í dag.

Fyri ein lærusáttmála innan handverkarayrkið, sum verður gjørdur 1. januar 2024 ella seinni, merkir broytingin í krónum, at lønarendurgjaldið lækkar umleið 25 tús. kr. fyri samlaðu

lærutíðina, um lærlingurin onga skúlagongd hevur, áðrenn hann fer í læru. Øvugt hækkar lønarendurgjaldið 50%, um arbeiðsloysið hækkar til meira enn 3,5%, sum í krónum merkir, at lønarendurgjaldið hækkar umleið 50 tús. kr. fyri hvønn lærusáttmála, um lærlingurin onga skúlagongd hevur, áðrenn hann fer í læru.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar, ið eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, ið eru viðkomandi fyri lógaruppskotið

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld, so sum nýtslugjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Tá broytingin verður gjørd, har stk. 6 verður til stk. 7, sum heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur, so má eisini gerast samsvarandi broyting í kunngerð nr. 63 frá 23. apríl 2003 um lønarendurgjald og ferðaendurgjald. Eftir at uppskotið til lógarbroytingina er samtykt, skal kunngerðin broytast soleiðis, at víst verður til heimildina í stk. 4 og 7.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1
Í §33, stk. 4 verður ásett, at endurgjaldið, sum landskassin endurrindar læruplássinum fyri lønina, sum tað hevur goldið lærlingi, meðan hann hevur tikið ta til læruna hoyrandi skúlagongd, verður 60% av minstuløni sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg, um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið 3,5% ella lægri, og 90% um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið omanfyri 3,5%.

Við hesi broyting verður lønarendurgjaldið gjørt konjunkturtongt, í mun til, at tað áður hevur verið fast 75%. Í ringum tíðum, tá arbeiðsloysið er høgt, skal lógin virka fyri at økja um áhugan fyri at seta lærlingar, tí lønarendurgjaldið fer upp á 90% av minstuløni sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg, ið merkir, at læruplássini fáa ein størri part av lønini endurgoldna, tað tíðarskeið lærlingurin er í skúla. Hinvegin lækkar lønarendurgjaldið niður á 60%, tá tíðirnar eru góðar og arbeiðsloysið er 3,5% ella minni.

Til § 1, nr. 2
Stk. 5. er ein áseting um, at lønarendurgjaldið verður ásett fyri hvønn einstakan lærusáttmála, tá ið lærusáttmálin verður undirskrivaður og verður síðani støðugt alt sáttmálaskeiðið. Hetta merkir, at um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið 3,5% ella minni, verður lønarendurgjaldið fyri alla skúlagongdina hjá hesum lærlinginum 60% av minstuløni sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfeløg. Øvugt, um miðal arbeiðsloysið seinastu seks mánaðirnar, innan lærusáttmálin verður undirskrivaður, hevur verið omanfyri 3,5%, verður lønarendurgjaldið 90% alt sáttmálaskeiðið.

Siga vit, at ein lærusáttmáli verður gjørdur í august 2023, skulu vit hyggja eftir miðal arbeiðsloysinum fyri februar til og við juli í 2023. Í dag síggja hesi tølini soleiðis út:

Februar	0,8%
Mars	0,8%
Apríl	0,7%
Mai	0,7%
Juni	0,6%
Juli	0,7%
Miðal	0,7%

Miðal arbeiðsloysið er niðanfyri 3,5%, ið merkir, at lønarendurgjaldið fyri henda lærusáttmálan vildi verið 60% alt sáttmálaskeiðið.

Til § 2
Gildiskoma er sett til 1. januar 2024. Lærusáttmálar, sum verða gjørdir 1. januar 2024 ella seinni, verða ávirkaðir av lógini.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 28. september 2023

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur